# Tíðindaskriv

**FIRST LEGO League Føroyar**
**27. november 2023**

# Klossarnir og Reyðar Tomatir vunnu føroysku FIRST LEGO League og kláraðu seg væl í donsku finaluni í Odense

## Liðini, sum vunnu føroysku FIRST LEGO League kappingina, tóku øll á bóli, tá tey luttóku í Danmarksfinaluni í Odense leygardagin 25.november saman við vinnandi liðum úr næstan 30 donskum býum.

Tey bæði føroysku liðini, sum vunnu stóru føroysku kappingina, gjørdu uppaftur meira burturúr á stórslignu Danmarksfinaluni í Odense. Hóast kappingin var hørð, kláraðu liðini seg væl. Liðið The Artech Innovators frá Billund vunnu Danmarksfinaluna og eru boðin at fara víðari til heimsmeistaraskapið í Texas. Klossarnir vunnu tvey steyp, nevnliga META-virðislønina og virðislønina fyri kjarnuvirðir.



*Tey bæði liðini Klossarnir og Reyðar Tomatir, sum vunnu føroysku FIRST LEGO League kappingina kláraðu seg væl í Danmarksfinaluni 25. november í Odense.*

META-virðislønina fingu Klossarnir fyri marknaðarføringina og flotta básin, har tey millum annað høvdu trummu, lego-klossar á høvdinum og vóru stuttligt ílatin til dagin.

Kjarnuvirðisløninina fingu Klossarnir millum annað fyri, at tey heppaðu á øll hini liðini og vístu ágrýtni og stríðsvilja, tá stórir trupulleikar vóru við robottinum.

Tann føroyska FIRST LEGO League kappingin, sum varð hildin á Skúlanum á Fløtum tann 11. november, savnaði í ár 28 lið av børnum og ungum úr øllum Føroyum. Kappingin gjørdist sostatt nógv tann størsta føroyska FIRST LEGO League kappingin, síðan tær byrjaðu í 2005.



*Skúlin á Fløtum gjørdist stórsligin karmur um føroysku FIRST LEGO League kappingina 11.november, har 28 lið úr øllum Føroyum vístu fram kynstur og hugflog.*

Landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, setti føroyska FIRST LEGO League dagin. Heitið á kappingini í ár var Masterpiece: Hvussu kunnu vit nýta hugflog og tøkni á nýskapandi hátt, sum kveikir áhuga fyri list og upplivingum? Børnini og tey ungu úr øllum Føroyum arbeiddu við uppgávum, bygging og programmering av robotti, og eini serstakari verkætlan við teirra egnu hugskotum til, hvussu tey kundu ímynda sær loysnir til at sameina t.d. list og tøkni.

Rógvi Langgaard hevur framleitt ein film frá føroyska FIRST LEGO League degnum 11. november: https://vimeo.com/885479197/32001a0552

Næsta ár verður føroyska FIRST LEGO League kappingin leygardagin 9. november 2024 og væntandi fara enn fleiri lið av børnum og ungum at luttaka. Evnið á kappingini verður almannakunngjørd í september 2024, og 8 vikur seinni hittast liðini til sjálvan kappingardagin.

Lið kunnu longu nú byrja at melda seg til og fara undir fyrireikingar við at skriva til Jákup Heinesen, fllforoyar@gmail.com

**Nærri kunning** og samband við fyriskiparar fæst við at venda sær til stýrið:

- Jákup Heinesen, Føroya FIRST LEGO League samskipari, fllforoyar@gmail.fo
- Harriet Hansen, harrieth@skulin.fo
- Jón Svein Heinesen, jonsvein@kvf.fo
- Lis Mortensen, lm@jf.fo